# P/F Vága Floghavn

**Flogvøllur 6, FO-380 Sørvágur**

**P/F-Skrás.nr.: 4800**

## Ársfrásøgn

## 2019

**AVRIT**

## Innihaldsyvirlit


**Síða**

**Átekningar**

Leiðsluátekning 1

Átekning frá óheftum grannskoðara 2

**Leiðslufrágreiðing**

Upplýsingar um felagið 5

Høvuðstøl og lyklatøl fyri konsernina 6

Høvuðstøl og lyklatøl fyri móðurfelag 7

Leiðslufrágreiðing 8

**Konsern- og ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2019**

Nýttur roknskaparháttur 19

Rakstrarroknskapur 25

Fíggjarstøða 26

Eginognaruppgerð fyri konsernina 30

Eginognaruppgerð fyri móðurfelag 30

Pengastreymsuppgerð 31

Notur 32

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2019 hjá P/F Vága Floghavn.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2019 hjá konsernini og felagnum og av úrslitinum av virkseminum og peningastreymunum hjá konsernini og felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Sørvágur, tann 23. apríl 2020

**Stjórn**

Regin Ingolfsson Jakobsen
stjóri

**Nevnd**

Regin Djurhuus Hammer
nevndarformaður

Birita Sandberg Samuelsen
næstforkvinna

Jógvan Páll Marius Lassen
nevndarlimur

Gunn Hanusardóttir Møller
nevndarlimur

Tórstein á Steig
starvsfólkavalt umboð

Sámal Birgir Johansen
starvsfólkavalt umboð

Evan Hilmarsson
starvsfólkavalt umboð

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigaran í P/F Vága Floghavn**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá P/F Vága Floghavn fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognar-uppgerð, pengastreymsuppgerð og notum, undir hesum nýttur roknskaparháttur fyri bæði konsernina og felagið. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2019 hjá konsernini og felagnum og av úrslitinum av virkseminum og peningastreymunum hjá konsernini og felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2019 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin". Vit eru óheft av konsernini samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av konsernroknskapinum og ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá konsernroknskapurin og ársroknskapurin verða gjørdir, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera konsernroknskapin og ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka konsernina ella felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin í síni heild ikki hava týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum , uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum  standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt konsernroknskapin og ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í konsernroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at konsernin og felagið ikki longur megna at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um konsernroknskapurin og ársroknskapurin vísa tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

- Fáa hóskandi og egnað grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplýsingunum um fyritøkurnar ella handilsvirksemið í konsernini til tess at røkka eini niðurstøðu um konsernroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um konsernroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av konsernroknskapinum og ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 23. apríl 2020

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vága Floghavn<br>Flogvøllur 6<br>FO-380 Sørvágur | |
| | Telefon: | 354400 |
| | Telefax: | 354401 |
| | Heimasíða: | www.fae.fo |
| | Skr.nr.: | 4800 |
| | V-tal: | 566713 |
| | Stovnað: | 14. juni 2007 |
| | Heimstaður: | Sørvágur |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Regin Djurhuus Hammer, nevndarformaður<br>Birita Sandberg Samuelsen, næstforkvinna<br>Jógvan Páll Marius Lassen, nevndarlimur<br>Gunn Hanusardóttir Møller, nevndarlimur<br>Tórstein á Steig, starvsfólkavalt umboð<br>Sámal Birgir Johansen, starvsfólkavalt umboð<br>Evan Hilmarsson, starvsfólkavalt umboð | |
| **Stjórn** | Regin Ingolfsson Jakobsen, stjóri | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |
| **Dótturfelag** | P/F Duty Free, Sørvágur | |

## Høvuðstøl og lyklatøl fyri konsernina

| | 2019<br>t.kr. | 2018<br>t.kr. | 2017<br>t.kr. | 2016<br>t.kr. | 2015<br>t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | | | | | |
| Bruttovinningur | 70.358 | 60.292 | 61.012 | 51.901 | 44.632 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 19.413 | 16.986 | 20.057 | 15.909 | 10.240 |
| Fíggjarligir postar, netto | -1.570 | -1.548 | -1.297 | -891 | -1.156 |
| Ársúrslit | 5.417 | 5.313 | 9.096 | 7.234 | 4.376 |
| **Fíggjarstøða:** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 919.374 | 915.471 | 912.592 | 861.887 | 847.852 |
| Eginogn | 833.603 | 828.186 | 822.872 | 813.777 | 806.542 |
| **Pengastreymar:** | | | | | |
| Rakstrarvirksemi | 29.941 | 27.945 | 29.256 | 27.184 | 15.607 |
| Íløguvirksemi | -18.382 | -21.895 | -54.041 | -28.928 | -10.607 |
| Fíggjarvirksemi | -10.256 | -9.177 | 27.352 | -859 | -2.128 |
| **Starvsfólk:** | | | | | |
| Miðaltal av fulltíðarsettum starvsfólkum | 60 | 53 | 51 | 50 | 49 |
| **Lyklatøl í %:** | | | | | |
| Eginognarpartur | 90,7 | 90,5 | 90,2 | 94,4 | 95,1 |
| Eginognaravkast | 0,7 | 0,6 | 1,1 | 0,9 | 0,6 |

Høvuðs- og lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal".

## Høvuðstøl og lyklatøl fyri móðurfelag

| | 2019<br>t.kr. | 2018<br>t.kr. | 2017<br>t.kr. | 2016<br>t.kr. | 2015<br>t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | | | | | |
| Bruttovinningur | 41.960 | 35.074 | 39.276 | 33.626 | 31.424 |
| Úrslit av vanligum rakstri | -1.597 | -1.136 | 4.400 | 3.195 | 2.366 |
| Fíggjarligir postar, netto | 7.262 | 6.039 | 5.313 | 4.512 | 2.275 |
| Ársúrslit | 5.417 | 5.313 | 9.096 | 7.234 | 4.376 |
| **Fíggjarstøða:** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 901.566 | 900.237 | 899.398 | 849.021 | 838.014 |
| Eginogn | 833.603 | 828.186 | 822.873 | 813.777 | 806.543 |
| **Pengastreymar:** | | | | | |
| Rakstrarvirksemi | 10.406 | 11.330 | 14.160 | 16.523 | 10.680 |
| Íløguvirksemi | -11.382 | -15.092 | -48.628 | -26.007 | -9.553 |
| Fíggjarvirksemi | -3.256 | -3.177 | 34.693 | 2.391 | -1.151 |
| Pengastreymar tilsamans | -4.232 | -6.939 | 225 | -7.093 | -24 |
| **Starvsfólk:** | | | | | |
| Miðaltal av fulltíðarsettum starvsfólkum | 45 | 39 | 39 | 38 | 37 |
| **Lyklatøl í %:** | | | | | |
| Eginognarpartur | 92,5 | 92,0 | 91,5 | 95,8 | 96,2 |
| Eginognaravkast | 0,7 | 0,6 | 1,1 | 0,9 | 0,6 |

Høvuðs- og lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal".

## Leiðslufrágreiðing

### Virksemi

P/F Vága Floghavn varð stovnað á aðalfundi 14. juni 2007 við heimild í løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 2007. Endamál felagsins er at reka flogvallarvirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

### Gongdin í 2019

Árið 2019 hjá Vága Floghavn var ikki rættiliga nøktandi. Ársins bruttoúrslit er 41.960 t.kr. ímóti 35.073 t.kr. í 2018. Úrslitið hjá samtakinum eftir skatt er eitt avlop upp á 5.417 t.kr. ímóti 5.313 t.kr árið fyri. Av tí at rakstur felagsins í sjálvum sær ikki hongur saman, metir leiðslan ikki úrslitið sum rættiliga nøktandi.

Samtaksroknskapurin fevnir um P/F Vága Floghavn sum móðurfelag og P/F Duty Free sum dótturfelag, sum Vága Floghavn eigur helvtina av og hevur avgerandi ávirkan á. Samtakið gav í 2019 eitt bruttoúrslit upp á 70,4 mió. kr. ímóti 60,3 mió. kr. árið fyri. Ársúrslitið gjørdist 13,9 mió. kr. ímóti 12,6 mió. kr. árið fyri. Av hesum var parturin hjá minnilutaáhugamálum ávikavíst 8,5 mió. kr. í 2019 og 7,3 mió. kr. í 2018.

Tað hevur sera stóran týdning fyri Vága Floghavn ár undan ári at hava nøktandi rakstrarúrslit, tí krøvini til flogvøllir í Europa verða herd í hesum tíðum, serliga viðvíkjandi útbúgving, starvsfólki og útgerð. Umframt hetta er íløgutørvurin sera høgur, og eisini hetta setur krøv til góð úrslit.

Arbeitt verður støðugt við tillagingum, soleiðis at flogvøllurin, farstøðin og tænastubygningarnir nøkta tørvin hjá brúkarunum. Harumframt verður hugt at møguleikum fyri at bøta enn meira um reglusemið á flogvøllinum.

Arbeitt verður somuleiðis støðugt við at tillaga grundraksturin hjá Vága Floghavn, fyri at halda hann so skynsaman sum til ber. Vit vita, at íløgutørvurin er hækkandi komandi árini, og tað fer at krevja áhaldandi góð úrslit. Nevnd og leiðsla í Vága Floghavn hava lagt seg eftir at leggja eina varliga rakstrar- og íløguætlan, soleiðis at fyritøkan er væl brynjað til framtíðina og framtíðaríløgur.

### Prísbroytingar

Eftir góða úrslitið í 2017 gjørdi Vága Floghavn av at lækka ferðafólkagjaldið við 25 kr. Lækkingin var galdandi frá 1. januar í 2019, men tað vísti seg skjótt, at hóast vøkstur í ferðafólkatalinum førdi lækkingin til hall í rakstri felagsins. Avgerð varð tí tikin um at hækka gjaldið aftur, soleiðis at við virknaði frá 1. apríl 2020 hækkar ferðafólkagjaldið við 30 kr.

Grundað á góða úrslitið í 2017 fór felagið í 2018 somuleiðis frá vanligu mannagongdini, at taka gjald fyri eyka upplating, tá ferðsla var millum kl. 21 og kl. 07. Eisini hesum viðvíkjandi hevur verið neyðugt at gera tillagingar, og fyri at fáa betri javnvág í rakstur felagsins varð gamla mannagongdin sett í verk aftur í 2019.

Áðrenn allur heimurin kom í undarligu støðuna við heimsfevnandi farsótt væntaði Vága Floghavn vøkstur í ferðafólkatalinum upp á umleið 8% í 2020, samanborið við ein staðfestan vøkstur á 12,3% í 2019. Fortreytirnar broyttust tó munandi miðskeiðis í mars, og ógvuliga ivasamt er, hvussu árið fer at roynast. Lítil ivi er um, at neyðugt verður at laga kostnaðarstøðið til broyttu umstøðurnar.

## Leiðslufrágreiðing

**Nýggjar inntøkur og meiri virksemi**
Ferðafólk eru framvegis greitt størsta inntøkukeldan hjá Vága Floghavn, men arbeitt verður støðugt við at menna nýggjar inntøkumøguleikar. Tað hevur higartil eydnast væl og eru inntøkur av parkering, leigugjøldum, leigugjøldum frá matarsølu og bilaútleigan o.a. vorðin ein týðandi partur av inntøkugrundarlagnum hjá Vága Floghavn. Framvegis verður arbeitt miðvíst við at vaksa um nýggju inntøkurnar, samstundis sum umstøðurnar at reka virksemi í Vága Floghavn alla tíðina verður ment.

**Fleiri flogfeløg**
Í oktober 2016 boðaði SAS frá, at tey høvdu ætlanir um at flúgva fast ímillum Keypmannahavn og Føroyar. Flúgvingin byrjaði í mars 2017, og fyri fyrstu ferð í meira enn 10 ár, var nú aftur kapping á Føroyaleiðini. Lítil ivi er um, at avleiðingarnar av kappingini síðani hava sæst aftur í ferðafólkatalinum, umframt prísi og tænastustigi. Síðani flogvøllurin bleiv longdur, hevur Vága Floghavn havt vitjan av fleiri flogførum og flogfeløgum, sum annars ikki hava roynt seg í Vágum áður. Vónandi heldur hendan gongdin fram í 2020.

**Skráseting av tjóðskapi hjá ferðafólki**
Í mong ár hevur ynski verið um at fáa skrásett tjóðskapin hjá teimum ferðafólkum, sum ferðast um Vága Floghavn, ikki minst fyri at fáa staðfest, hvussu nógvir útlendingar koma til Føroya. 1. januar 2019 varð skipan sett í verk, ið skrásetir tjóðskapin hjá øllum farandi ferðafólkum. Framman undan hesum hevur flogvøllurin ikki havt ítøkilig tøl at vísa á, men ferðafólkakanningar eru framdar tríggjar ferðir um árið síðan 2012, og geva kanningarnar ábendingar um hesi viðurskifti. Kanningarnar fyri 2018 vístu, at 35% av ferðafólkunum vóru útlendingar.

Í mun til tær kanningar og metingar gjørdar eru undanfarin ár vísa skrásetingarnar í nýggju skipanini í 2019, at meira enn helmingurin av teimum ferðandi eru búsitandi uttanlands, nevniliga 54%. Íroknað hesum eru føroyingar búsitandi uttanlands, sum telja umleið 7% av teimum ferðandi.




Hetta merkir, at av teimum 424.281 ferðandi um Vága Floghavn í 2019, hava 229.112 verið búsitandi uttanlands. Her er talan um ferðandi báðar vegir og merkir hetta, at umleið 15.000, tað er 7% av teimum ferðandi, eru føroyingar búsitandi uttanlands og umleið 100.000 (47% av teimum ferðandi) vóru útlendingar, sum komu loftvegis til Føroya í 2019.




Skipanin er innrættað soleiðis, at ymsar aðrar upplýsingar samstundis verða skrásettar, millum annað hvagar tann ferðandi skal o.a. Skrásetingarnar í nýggju skipanini eru ógvuliga virðismiklar fyri víðari arbeiðið hjá Vága Floghavn at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál. Allar skrásetingar eru tó dulnevndar, og tað ber ikki tí til at eyðmerkja persónar.

**Loftfarmur**

Loftvegis farmaflutningurin hevur verið støðugur og lutfalsliga lítil í mong ár. Av somu orsøk hevur Vága Floghavn so at siga ongar inntøkur havt av hesum. Kanningar eru fleiri ferðir gjørdar, um grundarlag er fyri at flúgva við rættiligum farmaflogførum, men higartil hevur einki flutningsfelag gjørt nakra ítøkiliga roynd av slíkum slag.

Í desember 2017 fór Bakkafrost í samstarvi við Posta og SAS undir eina roynd at flyta smærri nøgdir av feskum laksi loftvegis við ferðafólkaflogførum úr Føroyum til Keypmannahavnar og víðari haðani til keyparar í USA, Fjareystri og aðrastaðni.

Vága Floghavn gjørdi í hesum sambandi íløgur í neyðuga, nýmótans kanningarútgerð, soleiðis at kanningarnar av farminum kunnu avgreiðast í Føroyum heldur enn uttanlands. Hetta er ein fyrimunur, tí útflutta vøran nýtist ikki at verða umskipað til kanningar á øðrum flogvøllum, men kann fara beinleiðis umborð á tey flogfør, sum føra vøruna víðari úr Keypmannahavn.

Royndin eydnaðist so mikið væl, at avgjørt varð at halda fram, og í 2018 varð feskur laksur fluttur út bæði við SAS og Atlantic Airways. Tað sást týðiliga aftur í hagtølunum tá, við meira enn tvífaldari nøgd í 2018 í mun til 2017, men henda gongd helt ikki rættiliga fram í 2019, tí nøgdin minkaði við 23,5%. Talan er kortini um størri nøgd enn øll undanfarin ár, undantikið 2018.

Vága Floghavn vónar, at loftvegis útflutningurin av fiskavørum kann mennast enn meira, og at tað við tíðini kann geva flogvøllinum eitt bein afturat at standa á. Um talan verður um munandi vøkstur komandi árini, verður neyðugt at gera íløgu í eina nýggja farmahøll, sum eisini gevur møguleika til køling.

### Væntanir fyri 2020

Vága Floghavn hevði sum nevnt góðar vónir fyri 2020. Búskaparliga hevur gingið væl í Føroyum seinastu árini, og arbeiðsloysið er metlágt, undir 1%. Fólkatalið var við árslok 2019 farið upp um 52.000. Útlitini viðvíkjandi føroysku flogvinnuni vóru góð og Føroyar hava fingið nógva jaliga umrøðu sum ferðamál í altjóða miðlum seinastu árini.

Fram til 10. mars 2020 hækkaði ferðafólkatalið við 10,5% samanborið við sama tíðarskeið í 2019, men eftir hetta er ferðslan steðgað. Orsøkin er sum kunnugt avbjóðingin við alheimsfarsóttini KORONA ella KOVID-19. Sera trupult er at meta um, hvussu 2020 fer at hilnast, men útlitini eru ikki góð, hvørki fyri Vága Floghavn ella føroyska ferðavinnu sum heild. Við ársbyrjan væntaðu nevnd og leiðsla ein samlaðan vøkstur uppá umleið 8% í 2020, men staðfestast kann longu nú, at talan verður ikki um vøkstur. Spurningurin er heldur, hvussu stór minkingin verður, og hvussu stóra ávirkan henda fer at hava á rakstur felagsins.

## Útbyggingar

### Vága Floghavn útbygd

Eftir at flogvøllurin varð yvirtikin frá donskum myndugleikum í 2007 vórðu stig tikin til at leingja flogbreytina. Vøllurin varð longdur úr 1250 metrum upp í 1799 metrar, og í desember 2011 lendi fyrsta flogfarið á nýggja longda vøllinum. Longdi vøllurin hevur saman við nýggju ljósskipanini og nýggju innflúgvingartólunum roynst væl, og umvælingarnar hava bøtt munandi um flogvallarviðurskiftini og reglusemið á flogvøllinum í Vágum. Høvuðsendamálið við at leingja flogvøllin var at fáa betri møguleikar at menna flogvinnu í Føroyum. Leingingin førdi frá byrjan við sær, at Atlantic Airways fekk møguleikan at gera íløgur í størri og meira burðardygg flogfør, nevnliga Airbus 319. Í desember 2016 fekk felagið eitt Airbus 320, eitt A320neo kom á sumri í 2019 og eitt annað av sama slag kemur ætlandi seinni í 2020.

Broyttu umstøðurnar hava við sær, at munandi fleiri sløg av flogførum nú kunnu nýta flogvøllin. Seinastu árini hava vit sæð alsamt fleiri flogtýpur nýta Vága Floghavn; alt frá smærri jetflogførum, so sum Bombardier CRJ-200, Embraer ERJ135 og 145 og til størri Embraer ERJ195, Boeing 737-800, Airbus 319, A320 og A320neo.

Føroyingar hava, síðan flogvøllurin bleiv longdur, eisini fingið møguleikan til at flúgva beinleiðis til fleiri ferðamál á Miðalhavsleiðini, t.d. Barcelona, Mallorca, Kreta, Malta og Lissabon og Gran Kanaria um veturin. Síðani seinasta summar hevur eisini verið flogið í fastari rutu til Paris, eins og ætlanin er at gera nakrar túrar til New York seinni í ár.

Í 2008, áðrenn flogvøllurin varð longdur, var reglusemið á flogvøllinum í Vágum 96,6%. Árini síðani er reglusemið hækkað ár undan ári. Tá eitt nýtt flogfelag afturat í 2017 byrjaði at flúgva fasta rutuflúgving millum Vága Floghavn og Kastrup lækkaði kortini eitt vet, men eftir at nýggj navigatiónstøkni varð tikin í nýtslu hækkaði sum væntað aftur, soleiðis at talið í 2019 er komið heilt upp á 99,3%.




**Farstøðin og tænastubygningar**

Farstøðin og tænastubygningurin vórðu tikin í nýtslu 17. juni 2014. Nýggju nútíðarhóskandi umstøðurnar hava givið Vága Floghavn góðar møguleikar at mennast, og størsti denturin verður lagdur á at veita ferðafólkunum best møguligu upplivingina.

Hin 1. januar 2019 yvirtók Vága Floghavn raksturin av kunningardiskinum, og í hesum sambandi vórðu hølini dagførd, eins og høli til aðrar handilsligar tænastur.

Út frá teimum fortreytum, sum tá vóru galdandi, varð farstøðin mett at kunna avgreiða 400.000 ferðandi árliga. Tó skal viðmerkjast, at bæði stødd á flogførum og títtleikin av lendingum og fráferðum hava avgerandi týdning fyri eina slíka meting. Nú ferðafólkatalið fór væl upp um tey 400.000 í 2019 kunnu vit staðfesta, at farstøðin til tíðir hevur verið ógvuliga trong. Tí setti Vága Floghavn arbeiðið við at gera eina heildarætlan fyri framtíðar útbyggingar av floghavnini í gongd á sumri 2019. Henda heildarætlan er nú liðug, men tørvurin fyri útbygging kann ikki sigast at vera líka átrokandi nú, sum tá arbeiðið varð sett í gongd, av tí at bæði stutttíðar- og langtíðarávirkanin av korona-farsóttini á flogvinnuna enn er ókend.

**Hangarur**

Økta virksemið og størri flogfør hjá Atlantic Airways hava eisini viðført ein tørv á størri hangari hjá felagnum. Útbygging av hangarum er týðandi partur av heildarætlanini fyri framtíðar útbyggingar av floghavnini, sum endalig hond er løgd á í apríl 2020.

## Góðskutrygd og flogtrygd

Donsku loftferðslumyndugleikarnir, TBST (Trafik, Bolig- og Byggestyrelsen), ið hava eftirlit við Vága Floghavn, høvdu í 2019 fýra eftirlitsvitjanir innan BOR, CNS, Safety og AFIS, umframt fýra innan trygdareftirlit við ferðafólkum og frakt.

Yvirskipað eru skrásett lutfalsliga fá mál seinastu árini, og henda gongdin helt fram í 2019.

## Leiðslufrágreiðing

Nýggjur leiðari varð í 2019 settur í starv fyri trygdareftirlitið, umframt at nýggjur leiðari fyri flogtrygd, góðsku og KT varð settur í starv í januar 2020.

Tað er økt fokus á flogtrygd og góðsku frá loftferðslumyndleikanum. Orsakað av hesum hevur eitt miðvíst arbeiði verið í gerð við at dagføra flogtrygdarøkið og góðskuøkið í Vága Floghavn, millum annað við bygnaðarbroytingum og fleiri fólkum. Arbeiðið varð tó nakað seinkað av broytingum í starvsfólkahópinum í 2019.

Farið varð undir at útbúgva fleiri átaksleiðarar innan flogvallarøkið í 2019, og á heysti 2019 vóru 3 nýggir átaksleiðarar lidnir við útbúgvingina. Hesir eru tískil tøkir at virka sum avloysarar fyri verandi átaksleiðarar.

Á flogtrygdarøkinum varð farið undir at gera nýggja SMS-hondbók, sum verður liðug í 2020. SMS stendur fyri Safety Management System, so talan er um flogtrygdarhondbók. Innan góðskuøkið varð somuleiðis farið undir at gera nýggja QMS-hondbók, sum eisini verður liðug í 2020.

Í sambandi við AFIS-tænastuna í Torninum er eisini gjørt uppskot til nýggja QSMS-hondbók fyri AFIS-tænastuna. Hetta er liður í fyrireikingum til eina framtíðar yvirtøku av AFIS-tænastuni, og skal tí eisini góðkennast av loftferðslumyndugleikunum, áðrenn nýggjar mannagongdir verða settar í verk.

Viðvíkjandi trygdareftirlitinum hevur vøksturin í ferðafólkatalinum viðført ávísar tillagingar bæði viðvíkjandi manning og útgerð. Ein linja afturat er tikin í nýtslu í trygdareftirlitinum, sum eisini merkir, at fleiri fólk verða bundin til trygdareftirlitið. Hinvegin er nøgdin av farmi ikki økt samanborið við 2018, og hevur ikki viðført broytingar á tí økinum.

Seinastu árini eru krøvini til trygdareftirlit á flogvallum munandi broytt. Hetta er nú ein uppgáva sum krevur nógv, bæði viðvíkjandi manning, útbúgving og arbeiðsmannagongdum. Í 2019 varð byrjað uppá eitt miðvíst arbeiði at dagføra trygdareftirlitsskipanir í Vága Floghavn. Hetta arbeiðið kemur at halda fram í 2020.

Arbeiðið við at dagføra góðskutrygd og flogtrygd í Vága Floghavn heldur fram í 2020.

**Torn, tøknilig útgerð, lendingarbreyt o.a.**
Líka síðani flogvøllurin varð yvirtikin í 2007, hevur verið arbeitt miðvíst við at endurnýggja, betra og byggja út á tøkniliga økinum til tess at betra um tænastuna til flogfør og tyrlur.

Í 2017 varð farið undir at dagføra næstovastu hæddina í torninum. Einki var tá gjørt við hesa í fleiri ár, áðrenn flogvøllurin varð yvirtikin. Partur av gomlu hølunum í torninum varð umbygdur til umsiting, undirvísing og tøknirúm. Samstundis varð neyðug tillaging av RCMS-skipanini (Remote Control Monitoring System) í torninum gjørd, bæði fyri at lúka myndugleikakrøv, men eisini fyri at bøta um sjálva skipanina.

Vága Floghavn hevur í nógv ár leigað sær pláss til VHF-samskiftisútgerð í antennumastrini hjá landinum (Landsverk) á Sornfelli. Í desember 2017 fekk masturin stormskaða, og gjørt varð av at skifta mastrina út, umframt at nýggj útgerð varð sett upp. Antennurnar standa nú ovast uppi í 60 m høgu mastrini og røkka væl longri, enn tær gjørdu frammanundan. Hetta er sera týðandi samskiftisútgerð fyri flogfør og tyrlur.

Tað er nú nakað síðani, at farið varð undir fyrireikandi kanningar um møguleikarnar at flyta gamla innflúgvingarútgerð á flogvallarøkinum, bæði tí at hendan útgerðin er gomul og má skiftast út um ikki so langa tíð, men eisini tí at tørvur er á byggilendi í nærumhvørvinum. Neyðuga lendið er nú ognartikið, útgerðin keypt og neyðug loyvi fingin til vega. Ætlandi verður útgerðin sett upp í summar og tikin í nýtslu á heysti 2020.

Sonevnda markara innflúgvingarútgerðin í Mykinesi og Sørvági er skift, eins og radiovitin "VG" somuleiðis er skiftur. Henda útgerð var rættiliga gomul, frá sjeytiárunum, er nú skift og góðkend.

Av øðrum skipanum eru bæði innflúgvingarskipanin, RNP (Required Navigation Performance), og TWI skipanin (Turbulence Warning Indicator) góðkendar og verða dagliga nýttar. Skipanirnar hava stóran týdning fyri reglusemið í flogferðsluni. Nýggj skipan til tornið, ið verður brúkt til at avgreiða flogfør, flúgviætlanir við meira, varð somuleiðis góðkend av myndugleikunum og tikin í nýtslu í 2018.

Vága Floghavn avgjørdi í 2019 at fara undir at útbúgva fleiri AFIS-starvsfólk. Størsti parturin av útbúgvingini er tikin í Føroyum, og tað var ein søguligur dagur, tá fyrsti AFIS-næmingurin útbúgvin í Føroyum tók prógv í oktober 2019. Ein næmingur afturat er í gongd við útbúgvingina, og verður væntandi liðugur í seinnu helvt av 2020.

**Parkeringsøkið**
Arbeiðið at víðka um parkeringsøkið fór í gongd í september 2016 og varð handað Vága Floghavn í oktober 2017. Tó var avgjørt at útseta arbeiðið at gera innilokaðu gongdirnar út til parkeringsøkið og var tað liðugt í 2018. Ferðafólkini um Vága Floghavn hava verið sera glað fyri tær sonevndu lonirnar.

Vága Floghavn hevur somuleiðis fingið nýggjan veitara til parkeringskipanina. Gamla skipanin royndist illa og tað hevði neiliga ávirkan á kundaupplivingina. Nú er møguleiki at rinda fyri parkering við gjaldsstøðina í farstøðini ella í lonunum, umframt á heimasíðuni hjá Vága Floghavn og við appini Easypark. Skipanin er tikin í nýtslu og roynist væl.

**Rakstur og viðlíkahald í 2019**
Vága Floghavn fevnir um eitt sera stórt øki – uml. 800.000 fermetrar – og nógvar bygningar. Rakstur og viðlíkahald av bæði bygningum, lendingarbreyt, vegum, hegnum o.s.fr. er tí sera umfatandi og hevur stóra ávirkan á fíggjarligu viðurskifti felagsins.

Umframt hetta henda støðugt stórar broytingar og herðingar av myndugleikakrøvum til flogvøllir í hesum árum, og skal raksturin og allar mannagongdir tí eisini tillagast hesum krøvum. Hetta setur stór krøv til íløgur og eftirútbúgvingar til starvsfólk, soleiðis at flogvøllurin altíð livir upp til øll krøvini, sum verða sett.

## Leiðslufrágreiðing

Tá stóru útbyggingarverkætlanirnar vóru lidnar í 2015 avgjørdi nevndin, at arbeiðast skuldi við at skipa raksturin av virkseminum á flogvøllinum og við einari ætlan at skifta út gomul tól, samskiftisútgerð, bilar og maskinur.

Asfaltið á gamla partinum av lendingarbreytini er frá 1992, og tí stendur nýtt asfalt frammarlaga á íløguætlanini. Á sumri 2016 varð hesin parturin av asfaltinum viðgjørdur við eini serligari nýggjari viðgerð, soleiðis at asfaltið kann halda nøkur ár afturat – væntandi 3-5 ár – men tíðin er nú komin til at neyðugt verður at asfaltera av nýggjum.

Gamla bilhúsið við tornið varð tikið niður í 2015 og Vága Floghavn hevur stóran tørv á hølum. Upprunaliga var ætlanin, at eisini gamla brandgarasjan skuldi rívast niður, men leiðslan tók henda spurningin upp við loftferðslumyndugleikarnar, og um ársskiftið 2016/2017 var endaliga avgjørt, at bygningurin verður ikki tikin niður kortini. Ein partur av hølunum er gjørdur til nýtt timburverkstað og tøkniverkstað saman við hølum til reiðskap, ið skal brúkast á vøllinum og við vøllin. Eisini er gjørt eitt stórt nútímans undirvísingarhøli í bygninginum, av tí at krøvini til undirvísing og venjingar eru nógv økt seinastu árini.

Í 2019 og 2020 eru gjørdar umfatandi umvælingar av einum av gomlu garagubygningunum, sum var merktur av tíðarinnar tonn. Arbeiðið væntast liðugt móti sumri 2020.

Á tilbúgvingarøkinum verður eisini arbeitt við at nútímansgera útgerðina. Í februar 2016 fekk Vága Floghavn tveir nýggjar sløkkiliðsbilar frá fyritøkuni Rosenbauer í Eysturríki. Nýggju bilarnir eru væl útgjørdir, við m.a. stórum tangum og tveimum vatn/skúmsproytum á hvørjum bili. Bilarnir og útgerð kostaðu Vága Floghavn 8,4 mió.kr.

Vága Floghavn er ein sonevndur bólkur 6 (CAT 6) flogvøllur, har minsta kravið er at hava sløkkiliðsbilar við 8.000 litrum av vatni tilsamans. Við nýggju bilunum er Vága Floghavn komin upp á næstan 20.000 litrar og hevur tískil fingið góðkenning frá loftferðslumyndugleikunum til at uppraðfesta tilbúgvingina til ein CAT 7, um fyrispurningar koma um tað. Hetta merkir, at møguleiki er fyri at avgreiða enn størri flogfør, enn tey vit vanliga síggja í Vága Floghavn.

**Leiðsla**

Á aðalfundinum í apríl 2019, varð stórur partur av nevndini skiftur út, og inn komu Gunn H. Møller, Jógvan Páll Lassen, og Regin Hammer. Nevndin skipaði seg við Regini Hammer sum formanni og Oddbjørg Højgaard sum næstforkvinnu.

Í juli segði táverandi stjóri, Gudny Langgaard, seg úr starvi, og setti nevndin Oddbjørg Højgaard sum fyribils stjóra, meðan lýst varð eftir einum nýggjum stjóra. Stórur áhugi var fyri starvinum, og nógvar umsóknir komu inn, og valdi nevndin í oktober at seta Regin I. Jakobsen í starv sum stjóra.

Á eykaaðalfundi í januar 2020 varð Birita Sandberg Samuelsen vald í nevndina. Á nevndarfundi 21. februar 2020 skipaði nevndin seg av nýggjum við Regini Hammer sum formanni og Biritu Sandberg Samuelsen sum næstforkvinnu.

## Onnur mál

**Framtíðarútlit fyri menning og vøkstur hjá Vága Floghavn**

Grundleggjandi hevur leiðsla og nevnd felagsins góðar vónir um framtíðina, men støðan størsti parturin av heiminum er í í løtuni ávirkar rakstur felagsins almikið. Roknskapur felagsins vísir, at inntøkugrundarlagið er ment, og raksturin er um at verða burðardyggur, hóast út- og umbyggingar hava kravt eyka avskrivingar, og at rakstrarútreiðslurnar eru vaksnar vegna økt virksemi. Íløgutørvurin er tó sera stórur komandi árini og setur tað krøv til úrslit. Harumframt skal Vága Floghavn yvirtaka eftirlitstornið, AFIS Vagar, sum kemur at tyngja raksturin. Tilgongdin um yvirtøkuna er byrjað og verður væntandi endalig í 2020, um ikki onnur støða verður tikin. Skal Vága Floghavn framyvir hava ein burðardyggan rakstur og fíggja neyðugu íløgurnar, er neyðugt, at bøtt verður um úrslitið komandi árini.

**Brennievni til flogfør og tyrlur**

Vága Floghavn yvirtók í 2012 avgreiðsluna av brennievni til flogfør, sum nýta flogvøllin. Vága Floghavn hevur tó ikki brennievnissøluna um hendi, men hevur avgreiðsluna um hendi fyri orkufelagið EFFO. Síðani flogførini, sum brúka flogvøllin, eru vorðin størri, eru tey í størri mun farin at taka brennievni uttanlands, serliga í Danmark. Tað, at nøgdirnar av brennievni, sum verða tiknar í Føroyum eru so smáar, ger, at keyps- og goymslukostnaðurin er lutfalsliga høgur. Hetta er ein trupulleiki, sum í ringasta føri kann raka føroysku tyrlutilbúgvingina og flogvinnuna í Føroyum, og felagið vónar tí, at ein skilagóð loysn fæst á hesum í samstarvi millum oljufeløg, flogfeløg, flogvøllin og myndugleikarnar, soleiðis at prísurin á brennievni verður meira kappingarførur, enn tað vit síggja sum er.

Í 2019 fór EFFO undir at niðurleggja gomlu oljugoymsluna á flogvallarøkinum, og at gera nýggja skipan. Nýggj goymsla er í bingjum, sum eru fluttar á annað stað á flogvallarøkinum, umframt at nýggjur tangabilur og onnur útgerð er keypt í hesum sambandi.

**Marknaðarføring**

Síðan 2011 hevur Vága Floghavn verið á útvaldum sølustevnum uttanlands og hevur framt lýsingarátøk fyri at økja um áhugan fyri bæði flogvøllinum og Føroyum sum ferðamannalandi. Vága Floghavn fegnast um øktu játtanina til Visit Faroe Islands og vil menna samstarvið við Visit Faroe Islands og føroyska ferðavinnu enn meira.

**2020 higartil**

Stóri vøksturin í ferðafólkum, sum hevur verið seinastu árini, varð væntaður at halda fram í 2020, men ferðafólkatalið í 2020 er munandi ávirkað av korona-farsóttini, sum hevur rakt flog- og ferðavinnuna sera meint. Fyrsta ársfjórðing í 2020 hava vit havt eina minking upp á 12,6% í mun til somu tíð í 2019. Vága Floghavn hevur so at siga ongar inntøkur havt síðani miðskeiðis í mars 2020. Hvussu leingi hendan støðan kemur at standa við, dugir eingin at siga í løtuni. Útlitini fyri 2020 eru tí ótrygg, og sannlíkt er at tað verður ein munandi minking í ferðafólkatalinum, samanborið við 2019.




**Samanumtikið**

Samanumtikið kann tó sigast, at Vága Floghavn hevur góðar vónir um framtíðina, um vit hyggja nakað longur fram. Betraðu umstøðurnar framtíðartryggja virksemið á flogvøllinum og tryggja ikki minst betri inntøkumøguleikar av eitt nú parkering, tollfríari sølu á flogvøllinum og øktari sølu á matstøðum o.a. Íløgutørvurin komandi árini er stórur og krevur tað enn betri úrslit, um raksturin skal framhaldandi vera burðardyggur.

Vága Floghavn arbeiðir víðari við at menna umstøðurnar á flogvøllinum og at kanna møguleikarnar fyri at økja reglusemið enn meira og tryggja, at eitt nú Atlantic Airways, SAS og onnur fáa so góðar umstøður til at menna sítt virksemi so væl sum møguligt.

Eisini vil Vága Floghavn alla tíðina arbeiða við langtíðar menningarætlanum fyri at tryggja støðugan ferðafólkavøkstur og at menna føroysku flogferðsluna.

# Leiðslufrágreiðing

**Hendingar eftir roknskaparlok**

Í byrjanini av 2020 byrjaði alheimsfarsótt at gera vart við seg kring knøttin. Eisini Føroyar og føroyska samfelagið vórðu og eru rakt av hesum. Landsins myndugleikar byrjaðu at avmarka atgongdina hjá ferðafólkum til Føroya í mars mánaða og rakti hetta Vága Floghavn meint. Undanfarnu árini hevur vøksturin í ferðafólkatalinum um flogvøllin verið stórur. Útlitini fyri árið 2020 vóru eisini jalig, við einum vøkstri í januar og februar upp á ávikavist 10,1% og 9,6% í mun til árið frammanundan. Kovid-19 farsóttin kollvelti tó framburðin og steðgaði flogferðslan so at siga heilt dag frá degi hin 12. mars.

Til tess at vísa rættstundis umhugsni tók nevndin á nevndarfundi 22. mars avgerð um, at tillaga rakstur felagsins mest møguligt samsvarandi nógv minkaða virkseminum. Ítøkiliga fór stórur partur av operationella starvsfólkahópinum heilt ella lutvíst í nýskipaðu ALS-skipanina, ið kom í gildi í seinnu helvt av mars mánaða. Av tí at Vága Floghavn er partur av kritiska undirstøðukervi landsins, er tó neyðugt at hava nakað av starvsfólkum tøk til eitt nú SAR-virksemi og sjúkraflutning. Umframt hetta, hóast ógvuliga avmarkað, hevur nakað av flogferðslu verið hetta tíðarskeiðið, serliga innan sjúkraflutning, til starvsfólk innan heilsuøkið og sjófólk.

Sum er verða leys størv ikki sett, eins og alt ikki-bráðfeingis keyp er steðgað. Lønin hjá leiðslu felagsins varð lækkað við 20%, eins og nevnd felagsins segði frá sær nevndarsamsýning. Av øðrum átøkum kunnu verða nevnd, at fíggingarstovnur hevur játtað avdráttarskáa av langfreistaðu skuld felagsins – fyribils verður einans renta goldin í mars og apríl. Leiðsla felagsins hevur somuleiðis kannað møguleikar og fingið ikki bindandi tilsøgn frá fíggingarstovnum um fígging til framhaldandi rakstur, men fyribils vísa gjaldførisútrokningar ikki tørv á nýggjari lántøku. Hetta er tó sera stóran mun treytað av, hvussu drúgv farsóttin verður.

Enn er ógreitt nær flogferðslan fer at taka seg uppaftur. Somuleiðis er vert at hava í huga, at alheimsgerðin viðførir, at hóast gongdin í Føroyum kann tykjast jalig, eru flogferðsla og ferðavinna bundin at gongdini í øðrum pørtum av heiminum. Tískil er ógjørligt at meta um útlitini fyri 2020, men givið er, at fíggjarliga fer raksturin at geva hall.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri P/F Vága Floghavn er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í flokki C.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva konsernini fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr konsernini, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Konsernroknskapurin

Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið P/F Vága Floghavn og atknýtt felag, har P/F Vága Floghavn beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættindunum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan.

Í konsolideringini verða allar konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, innanhýsis millumverandi og vinningsbýti eliminerað. Somuleiðis verður staðfestur og óstaðfestur vinningur og tap frá handlum millum konsolideraðu feløgini elimineraður.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða javnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum á nettoognum og skyldum hjá atknýttu feløgunum á útveganardegnum.

### Minnilutaáhugamál

Í konsernroknskapinum verða roknskaparpostarnir hjá atknýttum fyritøkum innroknaðir 100%. Tann lutfalsligi partur, sum minnilutaáhugamál eiga av úrsliti og eginogn hjá atknýttum fyritøkum, verður javnaður árliga og verður vístur fyri seg niðanfyri rakstrarroknskapin og í serligum høvuðsposti undir eginognini.

## Rakstrarroknskapurin

### Bruttoúrslit

Bruttoúrslit umfatar nettosølu, broytingar í goymslum av liðugvørum, aðrar rakstrarinntøkur og annan uttanhýsis kostnað.

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskapar-lok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meir-virðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av vørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroytingar í árinum.

Aðrar rakstrarinntøkur umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum vinning og tap við sølu av immateriellari og materiellari støðisogn.

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir, tap av áognarum og operationellar leasingkostnaðir.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Av- og niðurskrivingar

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

## Nýttur roknskaparháttur

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligir postar umfata rentur, staðfestan og ikki staðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum umframt amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

### Inntøkur av kapitalparti í atknýttum feløgum

Í móðurfelags rakstrarroknskapinum verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýttum felagi innroknaður, eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

### Skattur av ársúrslitinum

Skattur í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður bókaður á eginognina.

## Fíggjarstøðan

### Immateriell støðisogn

Immateriell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Telduskipanir | 5 ár | 0 % |

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur frádrigið møguligt væntað restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Jøvn avskriving verður framd grundað á niðanfyristandandi meting av væntaðu brúkstíðunum og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Slitlag o.a. | 15 ár | 0 % |
| Bygningar, brunnar v.m. | 50 ár | 40 % |

| | | |
|---|---|---|
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3-10 ár | 0-20 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprís við frádrátti av sølukostnaðum og roknskaparliga virðið á søludegnum. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur og aðrir rakstrarkostnaðir.

**Niðurskriving av støðisogn**

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á bæði immateriellari og materiellari støðisogn, umframt kapitalpørtum í dótturfyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

**Innrætting av leigaðum hølum**

Innrætting av leigaðum hølum verður virðisásett til útveganarvirði við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðina hjá ognini, sum er sett til 10 ár.

**Fíggjarlig støðisogn**

**Kapitalpartar í atknýttum feløgum**

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá felagnum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi.

Nettouppskriving av kapitalparti í atknýttum feløgum verður skrásett undir eginognini í tiltaksgrunninum fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið. Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, ið kann væntast at vera samtykt, áðrenn hendan ársfrásøgnin verður góðkend, verður ikki bundið í innanvirðisgrunninum. Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognin í atknýttum feløgum.

**Depositum**

Depositum verður innroknað til amorteriserað útveganarvirði og er depositum fyri húsaleigu v.m.

**Vørugoymslur**

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

## Nýttur roknskaparháttur

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og hjálpartilfari fevnir um keypsprís umframt flutningsgjald.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparárið.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

**Eginogn**

**Yvirkursur við partabrævaútgávu**

Yvirkursur við partabrævaútgávu umfatar upphæddir, ið eru inngoldnar sum yvirkursur í mun til teknaðu kapitalpartarnar. Kostnaðir í sambandi við avgreidda partabrævaútgávu verður trekt frá yvirkursupphæddini. Tiltaksgrunnur til yvirkurs kann nýtast til vinningsbýti, grunnútgávu og at rinda hall.

**Grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum**

Grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum fevnir um nettouppskrivingar av kapitalpartum í dótturfyritøkum í mun til útveganarvirði.

Grunnurin kann eliminerast við halli, avhending av kapitalpartum og broyting í roknskaparligum metingum.

Grunnurin kann ikki innroknast við einari negativari upphædd.

**Vinningsbýti**

Vinningsbýti, sum væntandi verður útgoldið fyri roknskaparárið, verður tikið við sum serstakur postur undir eginognini. Uppskot til vinningsbýti verður tikið við sum skylda, tá tað er samtykt á aðalfundi.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

## Nýttur roknskaparháttur

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

**Skuld**
Skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Pengastreymsuppgerð

Pengastreymsuppgerðin vísir pengastreymarnar hjá konsernini og móðurfelagnum frá rakstri, íløgum og fígging fyri árið og broytingar í tøkum peningi umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

Tá feløg verða keypt ella seld, verður gjaldførisávirkanin víst fyri seg undir pengastreymum frá íløgum. Í pengastreymsuppgerðini verða pengastreymar viðvíkjandi keyptum feløgum innroknaðir frá útveganardegnum, og pengastreymar viðvíkjandi seldum feløgum verða innroknaðir fram til søludagin.

**Pengastreymar frá rakstri**
Pengastreymar frá rakstri verða gjørdir upp sum ársúrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarpostar, broyting í rakstrarfígging og goldnan partafelagsskattur.

**Pengastreymar frá íløgum**
Pengastreymar frá íløgum umfata gjøld í sambandi við keyp og sølu av feløgum og virksemi umframt keyp og sølu av støðisogn.

**Pengastreymar frá fígging**
Pengastreymar frá fígging umfata broytingar í stødd ella samanseting av felagskapitali og kostnaðir í hesum sambandi. Harumframt umfata pengastreymarnir lántøku, avdráttir av rentuberandi skuld og útgoldið vinningsbýti til eigararnar.

**Tøkur peningur**
Tøkur peningur umfatar tøkan pening umframt stuttfreistað virðisbrøv, ið lætt kunnu umbýtast við tøkan pening, og har tað er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | Konsern 2019 kr. | 2018 t.kr. | Móðurfelag 2019 kr. | 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Bruttoúrslit** | **70.358.348** | **60.292** | **41.959.612** | **35.074** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -34.779.747 | -29.119 | -28.418.813 | -23.365 |
| | Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | -16.165.970 | -14.187 | -15.137.418 | -12.845 |
| | **Rakstrarúrslit** | **19.412.631** | **16.986** | **-1.596.619** | **-1.136** |
| | Inntøkur frá kapitalpartum í atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | 8.462.681 | 7.321 |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 1.935 | 7 | 0 | 0 |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -1.571.519 | -1.555 | -1.201.019 | -1.282 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **17.843.047** | **15.438** | **5.665.043** | **4.903** |
| 2 | Skattur av ársúrsliti | -3.962.882 | -2.804 | -247.559 | 410 |
| | **Ársúrslit** | **13.880.165** | **12.634** | **5.417.484** | **5.313** |
| | Úrslit hjá minnilutaáhugamálum | -8.462.681 | -7.321 | 0 | 0 |
| | **Konsernsins partur av ársúrslitinum** | **5.417.484** | **5.313** | **5.417.484** | **5.313** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | Móðurfelag 2019 kr. | 2018 t.kr. |
|---|---|---|
| Grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum | 8.462.681 | 7.321 |
| Flutt frá fluttum úrsliti | -3.045.197 | -2.008 |
| **Býtt tilsamans** | **5.417.484** | **5.313** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### OGN

| Nota | | Konsern 2019 kr. | Konsern 2018 t.kr. | Móðurfelag 2019 kr. | Móðurfelag 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | | | |
| 3 | Ritbúnaður | 140.369 | 417 | 0 | 0 |
| | Immateriell støðisogn tilsamans | 140.369 | 417 | 0 | 0 |
| 4 | Lendi og flogbreyt | 645.150.314 | 644.959 | 645.150.314 | 644.959 |
| 5 | Bygningar, brunnar v.m. | 172.397.639 | 173.325 | 172.397.639 | 173.325 |
| 6 | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 49.661.492 | 46.174 | 49.099.965 | 44.989 |
| 7 | Útbygging (í gerð),umframt undangjøld | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 8 | Innrætting av leigaðum hølum | 579.447 | 708 | 0 | 0 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 867.788.892 | 865.166 | 866.647.918 | 863.273 |
| 9 | Kapitalpartur í atknýttum felagi | 0 | 0 | 11.234.148 | 9.771 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 0 | 0 | 11.234.148 | 9.771 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **867.929.261** | **865.583** | **877.882.066** | **873.044** |

# Fíggjarstøða 31. desember

## Ogn

| Nota | | Konsern 2019 kr. | Konsern 2018 t.kr. | Móðurfelag 2019 kr. | Móðurfelag 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | | | |
| | Handilsvørur | 4.300.186 | 4.991 | 0 | 0 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 4.300.186 | 4.991 | 0 | 0 |
| | Vøru- og tænastuáogn | 6.139.892 | 4.401 | 5.229.064 | 3.883 |
| | Áogn hjá atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | 1.297.430 | 1.213 |
| | Útsett skattaáogn | 26.352 | 69 | 0 | 69 |
| | Onnur áogn | 1.794.246 | 2.044 | 748.895 | 886 |
| 10 | Tíðaravmarkingar | 277.801 | 779 | 277.801 | 779 |
| | Áogn tilsamans | 8.238.291 | 7.293 | 7.553.190 | 6.830 |
| | Tøkur peningur | 38.906.532 | 37.604 | 16.130.309 | 20.363 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **51.445.009** | **49.888** | **23.683.499** | **27.193** |
| | **OGN TILSAMANS** | **919.374.270** | **915.471** | **901.565.565** | **900.237** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | Konsern 2019 kr. | Konsern 2018 t.kr. | Móðurfelag 2019 kr. | Móðurfelag 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | | | |
| 11 | Felagskapitalur | 493.500.000 | 493.500 | 493.500.000 | 493.500 |
| 12 | Yvirkursur í samb. við partabrævaútgávu | 304.495.623 | 304.496 | 304.495.622 | 304.496 |
| 13 | Grunnur fyri nettoopskriving eftir innaravirðisháttinum | 0 | 0 | 10.234.148 | 8.771 |
| 14 | Flutt úrslit | 35.607.501 | 30.190 | 25.373.354 | 21.419 |
| | **Eginogn tilsamans** | **833.603.124** | **828.186** | **833.603.124** | **828.186** |
| **15** | **Minnilutaáhugamál** | **11.234.148** | **9.771** | **0** | **0** |
| | **Avsettar skyldur** | | | | |
| 16 | Avsett til útsettan skatt | 178.666 | 74 | 178.666 | 0 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **178.666** | **74** | **178.666** | **0** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**Skyldur**

| Nota | | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 2019 | 2018 | 2019 | 2018 |
| | | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| | **Skuld** | | | | |
| 17 | Skuld til peningastovnar | 55.125.995 | 58.534 | 55.125.995 | 58.534 |
| | Langfreistað skuld tilsamans | 55.125.995 | 58.534 | 55.125.995 | 58.534 |
| | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 3.394.520 | 3.243 | 3.394.520 | 3.243 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 8.886.230 | 10.238 | 7.546.694 | 8.645 |
| | Skuld til assosieraðar fyritøkur | 261.286 | 263 | 0 | 0 |
| | Partafelagsskattur | 4.920.175 | 3.313 | 0 | 0 |
| | Onnur skuld | 1.770.126 | 1.849 | 1.716.566 | 1.629 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 19.232.337 | 18.906 | 12.657.780 | 13.517 |
| | **Skuld tilsamans** | **74.358.332** | **77.440** | **67.783.775** | **72.051** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **919.374.270** | **915.471** | **901.565.565** | **900.237** |

**18 Veðsetingar og trygdarveitingar**

**19 Nærstandandi partar**

## Eginognaruppgerð fyri konsernina

| | Felagskapitalur t.kr. | Yvirkursur við partabræva-útgávu t.kr. | Grunnur fyri nettoupp-skrivingar eftir innaravirðis-háttinum t.kr. | Flutt úrslit t.kr. | Tilsamans t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn 1. januar 2018 | 493.500 | 304.496 | 0 | 24.877 | 822.873 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 0 | 5.313 | 5.313 |
| Eginogn 1. januar 2019 | 493.500 | 304.496 | 0 | 30.190 | 828.186 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 0 | 5.418 | 5.418 |
| | **493.500** | **304.496** | **0** | **35.608** | **833.604** |

## Eginognaruppgerð fyri móðurfelag

| | Felagskapitalur t.kr. | Yvirkursur við partabræva-útgávu t.kr. | Grunnur fyri nettoupp-skriving eftir innaravirðis-háttinum t.kr. | Flutt úrslit t.kr. | Tilsamans t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn 1. januar 2018 | 493.500 | 304.496 | 7.450 | 17.427 | 822.873 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 7.321 | -2.008 | 5.313 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -6.000 | 0 | -6.000 |
| Vinningsbýti flutt frá tiltaksgrunni | 0 | 0 | 0 | 6.000 | 6.000 |
| Eginogn 1. januar 2019 | 493.500 | 304.496 | 8.771 | 21.419 | 828.186 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 8.463 | -3.045 | 5.418 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -7.000 | 0 | -7.000 |
| Vinningsbýti flutt frá tiltaksgrunni | 0 | 0 | 0 | 7.000 | 7.000 |
| | **493.500** | **304.496** | **10.234** | **25.374** | **833.604** |

## Pengastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember

| Nota | | Konsern 2019 kr. | Konsern 2018 t.kr. | Móðurfelag 2019 kr. | Móðurfelag 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ársúrslit | 5.417.484 | 5.313 | 5.417.484 | 5.313 |
| 20 | Javningar | 30.031.734 | 25.551 | 7.993.932 | 6.353 |
| 21 | Broyting í rakstrarpeningi | -1.730.150 | 1.212 | -1.803.948 | 946 |
| | Pengastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar | 33.719.068 | 32.076 | 11.607.468 | 12.612 |
| | Rentuinngjaldingar og líknandi | 1 | -1 | 1 | 0 |
| | Rentuútgjaldingar og líknandi | -1.569.584 | -1.282 | -1.201.019 | -1.282 |
| | Pengastreymar frá vanligum rakstri | 32.149.485 | 30.793 | 10.406.450 | 11.330 |
| | Goldin partafelagsskattur | -2.208.677 | -2.848 | 0 | 0 |
| | **Pengastreymar frá rakstri** | **29.940.808** | **27.945** | **10.406.450** | **11.330** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -19.027.179 | -21.991 | -19.027.179 | -21.188 |
| | Søla av materiellari støðisogn | 645.000 | 96 | 645.000 | 96 |
| | Móttikið vinningsbýti | 0 | 0 | 7.000.000 | 6.000 |
| | **Pengastreymar frá íløgum** | **-18.382.179** | **-21.895** | **-11.382.179** | **-15.092** |
| | Broyting í langfreistaðari skuld | -3.256.411 | -3.177 | -3.256.411 | -3.177 |
| | Goldið vinningsbýti | -7.000.000 | -6.000 | 0 | 0 |
| | **Pengastreymar frá fígging** | **-10.256.411** | **-9.177** | **-3.256.411** | **-3.177** |
| | **Broyting í tøkum peningi** | **1.302.218** | **-3.127** | **-4.232.140** | **-6.939** |
| | Tøkur peningur primo | 37.604.314 | 40.731 | 20.362.449 | 27.302 |
| | **Tøkur peningur ultimo** | **38.906.532** | **37.604** | **16.130.309** | **20.363** |
| | | | | | |
| | **Tøkur peningur** | | | | |
| | Tøkur peningur | 38.906.532 | 37.604 | 16.130.309 | 20.363 |
| | **Tøkur peningur ultimo** | **38.906.532** | **37.604** | **16.130.309** | **20.363** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 2019 | 2018 | 2019 | 2018 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **1. Starvsfólkakostnaðir** | | | | |
| Lønir | 30.104.398 | 25.163 | 24.646.148 | 20.158 |
| Eftirlønir | 3.228.489 | 2.790 | 2.591.904 | 2.269 |
| Onnur almenn gjøld | 1.446.860 | 1.166 | 1.180.761 | 938 |
| | **34.779.747** | **29.119** | **28.418.813** | **23.365** |
| Stjórn | 1.197.340 | 874 | 1.225.533 | 874 |
| Nevnd | 592.184 | 453 | 482.501 | 407 |
| | **1.789.524** | **1.327** | **1.708.034** | **1.281** |
| Starvsfólk í miðal | 60 | 53 | 45 | 39 |
| **2. Skattur av ársúrsliti** | | | | |
| Skattur av ársúrsliti | 3.815.839 | 3.313 | 0 | 0 |
| Broyting í útsettum skatti | 147.043 | -509 | 247.559 | -410 |
| | **3.962.882** | **2.804** | **247.559** | **-410** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2019 | 31/12 2018 | 31/12 2019 | 31/12 2018 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **3. Ritbúnaður** | | | | |
| Útveganarvirði primo | 1.242.506 | 1.067 | 0 | 0 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 175 | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **1.242.506** | **1.242** | **0** | **0** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -825.001 | -551 | 0 | 0 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -277.136 | -274 | 0 | 0 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-1.102.137** | **-825** | **0** | **0** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **140.369** | **417** | **0** | **0** |

| | | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 31/12 2019 | 31/12 2018 | 31/12 2019 | 31/12 2018 |
| | | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **4.** | **Lendi og flogbreyt** | | | | |
| | Útveganarvirði primo | 675.219.880 | 667.403 | 675.219.880 | 667.403 |
| | Tilgongd í árinum | 3.904.739 | 7.817 | 3.904.739 | 7.817 |
| | **Útveganarvirði ultimo** | **679.124.619** | **675.220** | **679.124.619** | **675.220** |
| | Av- og niðurskrivingar primo | -30.260.623 | -26.845 | -30.260.623 | -26.845 |
| | Ársins av-/niðurskrivingar | -3.713.682 | -3.416 | -3.713.682 | -3.416 |
| | **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-33.974.305** | **-30.261** | **-33.974.305** | **-30.261** |
| | **Roknskaparligt virði ultimo** | **645.150.314** | **644.959** | **645.150.314** | **644.959** |
| **5.** | **Bygningar, brunnar v.m.** | | | | |
| | Útveganarvirði primo | 200.860.292 | 199.496 | 200.860.292 | 199.496 |
| | Tilgongd í árinum | 3.350.149 | 1.365 | 3.350.149 | 1.365 |
| | **Útveganarvirði ultimo** | **204.210.441** | **200.861** | **204.210.441** | **200.861** |
| | Av- og niðurskrivingar primo | -27.536.006 | -23.372 | -27.536.006 | -23.372 |
| | Ársins av-/niðurskrivingar | -4.276.796 | -4.164 | -4.276.796 | -4.164 |
| | **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-31.812.802** | **-27.536** | **-31.812.802** | **-27.536** |
| | **Roknskaparligt virði ultimo** | **172.397.639** | **173.325** | **172.397.639** | **173.325** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2019 | 31/12 2018 | 31/12 2019 | 31/12 2018 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **6. Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv** | | | | |
| Útveganarvirði primo | 88.437.807 | 74.177 | 84.443.158 | 70.810 |
| Tilgongd í árinum | 11.772.290 | 12.634 | 11.772.290 | 12.006 |
| Frágongd í árinum | -1.200.400 | -351 | -1.200.400 | -351 |
| Flytingar | 0 | 1.977 | 0 | 1.977 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **99.009.697** | **88.437** | **95.015.048** | **84.442** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -42.263.399 | -36.358 | -39.452.926 | -34.486 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -7.769.589 | -6.203 | -7.146.940 | -5.265 |
| Av-/niðurskrivingar, avhendaðar ognir | 684.783 | 298 | 684.783 | 298 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-49.348.205** | **-42.263** | **-45.915.083** | **-39.453** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **49.661.492** | **46.174** | **49.099.965** | **44.989** |
| **7. Útbygging (í gerð),umframt undangjøld** | | | | |
| Útveganarvirði primo | 0 | 1.977 | 0 | 1.977 |
| Flytingar | 0 | -1.977 | 0 | -1.977 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **0** | **0** | **0** | **0** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2019 | 31/12 2018 | 31/12 2019 | 31/12 2018 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **8. Innrætting av leigaðum hølum** | | | | |
| Útveganarvirði primo | 1.288.058 | 1.288 | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **1.288.058** | **1.288** | **0** | **0** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -579.845 | -451 | 0 | 0 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -128.766 | -129 | 0 | 0 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-708.611** | **-580** | **0** | **0** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **579.447** | **708** | **0** | **0** |
| **9. Kapitalpartur í atknýttum felagi** | | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 0 | 0 | 1.000.000 | 1.000 |
| **Útvegnarvirði ultimo** | **0** | **0** | **1.000.000** | **1.000** |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 0 | 0 | 8.771.467 | 7.450 |
| Ársúrslit, áðrenn avskrivingar av goodwill | 0 | 0 | 8.462.681 | 7.321 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -7.000.000 | -6.000 |
| **Uppskrivingar ultimo** | **0** | **0** | **10.234.148** | **8.771** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **0** | **0** | **11.234.148** | **9.771** |

**Atnýttar fyritøkur:**

| | Heimstaður | Ognarpartur |
|---|---|---|
| P/F Duty Free | Sørvágur | 50 % |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2019 | 31/12 2018 | 31/12 2019 | 31/12 2018 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |
| **10. Tíðaravmarkingar** | | | | |
| Forútgjaldingar | 277.801 | 779 | 277.801 | 779 |
| | **277.801** | **779** | **277.801** | **779** |
| **11. Felagskapitalur** | | | | |
| Felagskapitalur primo | 493.500.000 | 493.500 | 493.500.000 | 493.500 |
| | **493.500.000** | **493.500** | **493.500.000** | **493.500** |

Felagskapitalurin er býttur sundur í partabrøv á kr. 1,00 og multipla av hesum. Øll partabrøvini hava somu rættindi.

Tey seinastu 5 árini hava hesar rørslur verið á felagskapitalinum:

Kapitalhækking í 2014: 60.000.000 kr.
Kapitalhækking í 2015: 20.200.000 kr

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2019 | 31/12 2018 | 31/12 2019 | 31/12 2018 |
| **12. Yvirkursur í samb. við partabrævaútgávu** | | | | |
| Yvirkursur í samb. við partabrævaútgávu primo | 304.495.623 | 304.496 | 304.495.622 | 304.496 |
| | **304.495.623** | **304.496** | **304.495.622** | **304.496** |
| **13. Grunnur fyri nettoopskriving eftir innaravirðisháttinum** | | | | |
| Grunnur fyri uppskriving primo | 0 | 0 | 8.771.467 | 7.450 |
| Partur av ársúrsliti | 0 | 0 | 8.462.681 | 7.321 |
| Vinningsbýti | 0 | 0 | -7.000.000 | -6.000 |
| | **0** | **0** | **10.234.148** | **8.771** |

| | Konsern | | Móðurfelag | |
|---|---|---|---|---|
| | 31/12 2019 | 31/12 2018 | 31/12 2019 | 31/12 2018 |
| | kr. | t.kr. | kr. | t.kr. |

**14. Flutt úrslit**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Flutt úrslit primo | 30.190.017 | 24.877 | 21.418.551 | 17.427 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 5.417.484 | 5.313 | -3.045.197 | -2.008 |
| Vinningsbýti flutt frá tiltaksgrunni | 0 | 0 | 7.000.000 | 6.000 |
| | **35.607.501** | **30.190** | **25.373.354** | **21.419** |

**15. Minnilutaáhugamál**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Minnilutaáhugamál primo | 9.771.467 | 8.450 | 0 | 0 |
| Minnilutaáhugamál | 8.462.681 | 7.321 | 0 | 0 |
| Vinningsbýti | -7.000.000 | -6.000 | 0 | 0 |
| | **11.234.148** | **9.771** | **0** | **0** |

**16. Avsett til útsettan skatt**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Avsett til útsettan skatt primo | 74.164 | 74 | -68.893 | 341 |
| Útsettur skattur av ársúrsliti | 104.502 | 0 | 247.559 | -410 |
| | **178.666** | **74** | **178.666** | **-69** |

**17. Skuld til peningastovnar**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til peningastovnar tilsamans | 58.520.515 | 61.777 | 58.520.515 | 61.777 |
| Fellur til gjaldingar innan 1 ár | -3.394.520 | -3.243 | -3.394.520 | -3.243 |
| | **55.125.995** | **58.534** | **55.125.995** | **58.534** |
| Partur av skuld, sum fellur til gjaldingar aftaná 5 ár | 40.903.671 | 44.893 | 40.903.671 | 44.893 |

### 18. Veðsetingar og trygdarveitingar

Sum trygd fyri skuld til peningastovnar, 58.521 t.kr., hevur móðurfelagið latið veð í fastari ogn, hvørs roknskaparligu virðir pr. 31. desember 2019 eru 817.548 t.kr. Veðsetingin er í mesta lagi 55 mió.kr.

Móðurfelagið hevur móttikið trygdarveitingar frá entreprenørum, leigarum o.t. uppá 18.930 t.kr.

Móðurfelagið hevur veitt 200 t.kr. sum trygd fyri tollkreditti.

### 19. Nærstandandi partar

**Eigaraviðurskifti**

Hesi eru skrásett í partabrævabók felagsins at eiga meira enn 5% av atkvøðunum ella meira enn 5% av partabrøvunum:
Føroya Land

| | Konsern 2019 kr. | Konsern 2018 t.kr. | Móðurfelag 2019 kr. | Móðurfelag 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| **20. Javningar** | | | | |
| Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | 16.165.970 | 14.187 | 15.137.418 | 12.845 |
| Vinningur / tap við avhending av støðisogn | -129.383 | -43 | -129.383 | -43 |
| Inntøkur frá kapitalpartum í atknýttum fyritøkum | 0 | 0 | -8.462.681 | -7.321 |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 1.569.584 | 1.282 | 1.201.019 | 1.282 |
| Skattur av ársúrsliti | 3.962.882 | 2.804 | 247.559 | -410 |
| Úrslit hjá minnilutaáhugamálum | 8.462.681 | 7.321 | 0 | 0 |
| | **30.031.734** | **25.551** | **7.993.932** | **6.353** |

| | Konsern 2019 kr. | Konsern 2018 t.kr. | Móðurfelag 2019 kr. | Móðurfelag 2018 t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| **21. Broyting í rakstrarpeningi** | | | | |
| Broyting í vørugoymslum | 690.758 | 218 | 0 | 0 |
| Broyting í áogn | -988.723 | 1.583 | -793.761 | 1.901 |
| Broyting í vøru- og tænastuskuld og aðrari skuld | -1.432.185 | -589 | -1.010.187 | -955 |
| | **-1.730.150** | **1.212** | **-1.803.948** | **946** |